Umframt leiting og bjarging skal tyrlutænastan hjá Atlantsflog eisini kunna røkja a›rar tænastur so sum flutningstænastur av sama slag, sum gamla tyrlan higartil hevur gjørt

Mynd: Edvard Joensen

Tyrlutænastan skal vera føroysk

Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur, hevur lagt uppskot um tyrluflúgving fyri Løgtingi›. Dentur ver›ur lagdur á, at tænastan ver›ur røkt av føroyingum. Men kostna›urin fyri tænastuna er ein samrá›ingarloysn millum Fiskimálast‡ri› og Atlantsflog

TYRLUFLÚGVING
Edvard Joensen

Í samband vi› tilbúgvingarætlan skal tyrlutænastan byggjast út. Men tænastan ver›ur ikki bo›in út. Sambært lógaruppskotinum, landsst‡risma›urin hevur lagt fyri tingi›, skal Atlantsflog røkja tænastuna.

Í uppskoti um tyrluflúgving, sum Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur, leg›i fyri tingi› annan november, ver›ur beinlei›is nevnt, at P/F Atlantic Airways skal røkja hesa flúgving komandi 10 árini. Sostatt eru øll onnnur feløg, sum kundu hugsa› sær at bo›i› upp á tænastuna, útistongd hesa tí›ina, um uppskoti› ver›ur samtykt, sum ta› er lagt fram.

Kostna›in fyri raksturin av tyrluni hava Fiskimálast‡ri› og Atlantsflog samrátt seg fram til, sigur Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur.

Landskassin skal gjalda Atlantsflogi hálvtanna›hundra› milliónir fyri hesa flúgving. 10 milliónir eru settar av í ár, og komandi 10 árini er ætlanin at seta 14 milliónir krónur av árliga. Hendan upphæddan skal tó kunna javnast, alt eftir, hvussu útrei›slurnar og inntøkurnar av tyrlutænastuni ver›a. Til at røkja tænastuna ver›ur ein n‡ggj tyrla keypt fyri 6,6 milliónir dollarar. Jørgen Niclasen sigur, at eingir almennir pengar eru brúktir til hetta keypi›. Ta› hevur Atlantsflog sjálvt klára›, sigur hann.

Men hann avvísir ikki, at ta› almenna Atlantsflog hevur fingi› fígging úr tí almenna íløgugrunninum.

Sambært uppskotinum hjá landsst‡rismanninum fevnir tyrluflúgvingin um leiting á sjógvi og landi. Eftirlitsflúgving fyri Fiskivei›ieftirliti›, sjúkraflutning og brá›feingis flúgving, har tørvur er á skjótari hjálp.

Máli› er beint í Vinnunenvndina, sum hevur kanna› eftir, um a›rir møguleikar eru fyri hesi tænastuni. Sum Sosialurin skilir, hevur Vinnunevndin havt samband a›rar vegir enn til Atlantsflog fyri at hava okkurt at sammeta vi›. Og ikki allir vinnunevndarlimirnir eru eins nøgdir vi› uppskoti› hjá landsst‡rismanninum eftir vi›ger›ini í Løgtinginum at døma.

Men Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur, hevur læst seg fastan í, at Atlantsflog skal røkja tænastuna. Hann grundgevir sína stø›u vi›, at hann vil byggja eina tænastu upp í Føroyum, sum føroyingar eru førir fyri at røkja. Og ta› klára vit ikki, um vit bjó›a út til a›rar, sigur hann. Tá hendir bara ta›, at tænastan fer á útlendskar hendur, og peningurin, sum gjaldast skal fyri tænastuna, fer av landinum.

Vi› hesum váttar Jørgen Niclasen í grundini, at her gongur nationalur stoltleiki fram um trygdina, sigur ein kelda, Sosialurin hevur tosa› vi›. Keldan vil vera vi›, at landsst‡risma›urin er óseriøsur í sínum arbei›shátti, tá hann læsir seg fastan í eitt felag, sum beinlei›is ver›ur nevnt í lógartekstinum, og harvi› útilokar øll onnur feløg.

Men ta› er ikki, sigur Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur. Hann váttar, at hann hevur gjørt av, at ta› skal vera Atlantsflog, sum skal hava tyrluflúgvingina vi› á›ur nevndu grundgevingum.

– Tí hev›i ta› veri› óseriøst at fari› út at spurt a›rar um prís, tá vit kortini fóru at lata Atlantsflog reka tænastuna.

Var› spurt a›rasta›ni, metir landsst‡risma›urin, at hann hev›i veri› noyddur at tiki› av lægsta tilbo›num, sum hann avgjørt metir hev›i veri› útlendskt.

Spurdur um ta› ikki eisini er óseriøst at gera av, at eitt ávíst felag skal hava tænastuna, uttan at hugsa um prísin, sigur Jørgen Niclasen, at solei›is hongur ta› als ikki saman.

Tá hildi› ver›ur fram, at vanligt er a›rasta›ni í slíkum førum, at ra›fest ver›ur solei›is, at trygdin kemur fyrst, sí›an fíggjarspurningar og at enda nationalitetur, me›an føroyingar tykjast arbei›a í øvugtari ra›fylgu, svarar landsst‡risma›urin bara, at ta› er tvætl.

Men útgreiningin av kostna›inum tykist kortini eitt sindur torskyld. Landsst‡risma›urin kundi ikki leggja fram eina neyva kostna›arætlan fyri tænastuna, men seg›i tølini, sett eru í lógartekstin, vera komin fram eftir samrá›ingar millum Fiskimálast‡ri› og Atlantsflog.

– Og hetta er avgjørt ta› lægsta tali›, vit kundu koma til.

Framvegis undrast bla›ma›urin á, hví tænastan eftir gó›um borgarligum si›i ikki er bo›in út. Landsst‡risma›urin tekur upp aftur, at avgjørt var, at tænastan skuldi vera føroysk. Hann hev›i kanna›, hvussu gjørt var› í londum rundan um okkum. Og ta› vísir seg í øllum grannalondum okkara, at tá talan er um leiting og bjargingartænastur, eru tær allar nationalar, me›an a›rar tænastur, sum eitt nú flúgving í samband vi› oljuvinnu, ver›a bodnar út.

Tyrlutænastan í Føroyum hevur veri› ov ótrygg, sigur Jørgen Niclsasen, landsst‡risma›ur. Tí er ney›ugt at keypa eina tyrlu aftrat, solei›is at vit kunnu tryggja okkum, at altí› ein tyrla er til at taka, um brúk skuldi veri› fyri tí.

At danska sjóverjutyrlan hevur veri› til taks, metir hann ikki sum nóg gó›a trygd. Heldur ikki, at ríkisumbo›sma›urin í svari til løgtingsmann hevur sagt, at danska sjóverjan fer at halda fram vi› tyrlutænastuni sum higartil.

Danska tyrlan hevur ikki veri› nóg álítandi, sigur Jørgen Niclasen. Ta› hevur veri› ov ofta at frætt, at danir skulu spara, og so eru tyrlumanningarnar skerdar.

Esini sigur Jørgen Niclasen, at ta› krevur naka› heilt serligt at flúgva tyrlu í føroyskum loftrúmi. Serligur lokalkunnleiki skal til, sum hann bara metir, at føroyingar hava. Spurdur um ta› ikki bara er ein spurningur um venjing, sum eisini útlendingar kunnu koma eftir, vísir hann bara spurninginum frá sær.

Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur heldur ta› ikki vera so løgi›, at n‡ggja tyrlan skal vera næstan tríggjar fer›ir so d‡r at reka, sum tann gamla. Hendan n‡ggja er nógv betri útgjørd, og kostna›urin upp á 6,6 milliónir dollarar skal eisini forrentast. Ta› skal millum anna› avtalan vi› Fiskimálast‡ri› gera. Men ta› stendur í lógartekstinum, at hendan upphædd kann regulerast alt eftir inntøkum ella útrei›slum hjá Atlantsflog.

Hinvegin hevur Fiskimálast‡ri› treyta› sær, at serskildur tyrluroknskapur skal ver›a førdur fyri n‡ggju tyrluna. Ta› ver›ur ikki gjørt fyri ta gomlu. Atlantsflog fær fimm milliónir krónur árliga á fíggjarlógini til rakstur av tyrlutænastuni kring oyggjarnar. Men ta› máli› liggur undir Vinnumálast‡rinum, og ta› kann Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur vi› fiskivinnumálum ikki taka sær av. At hann hevur lagt umrødda lógaruppskot fram, kemst av, at n‡ggja tyrlan skal brúkast sum leitingar- og bjarlingartyrla eins og eftirlitstyrla hjá Fiskivei›ieftirlitinum.

Dúgvan kollsigldi:

Orsøkin óvanligt náttúrufyribrigdi

Skiparin á Dúgvuni, Sámal Jákup Hansen, á›renn hann fór til sjófrágrei›ing í Dómhúsinum

Mynd: Jens Kr. Hansen

Sambært skiparanum á Dúgvuni vóru ta› óvanliga sí› alda, sum var orsøkin til, at Dúgvan tók botn í innsiglingini til Leirvíkar havn tann 13. november, og slíkum kann ein ikki verja seg fyri

SJÓFRÁGREI‹ING
Stefan í Skorini

Fríggjamorgunin var sjófrágrei›ing í Dómhúsinum í Havn um óhappi›, tá Dúgvan tók botn á veg til Leirvíkar úr Klaksvík. Skiparin á Dúgvuni, Sámal Jákup Hansen, greiddi frá tilbur›inum.

Í síni frágrei›ing seg›i hann, at beint á›renn Dúgvan kom innum molan, fekk skipi› knappliga tríggjar stórar og sí›ar aldur. Tá var skipi› eini 60-90 metrar frá molanum. Skiparin føldi, at skipi› fekk ein stoyt. Hann helt fyrst, at ein trailari var koppa›ur á bildekkinum, men á bildekkinum var alt í lagi.

Dúgvan hev›i tiki› botn, og ein riva var komin í kjølin. Rivan var 30 sentimetrar long og 5 sentimetrar brei›. Tá skipi› hev›i lagt at, vór›u pumpurnar longu farnar í gongd.

Náttúrufyribrigdi

Hann greiddi ví›ari frá, at ta› rak hart henda dagin, og ta› var hør› mysing. Ættin var útnyr›ingur 13-14 metrar um sekundi›, og ta› var allarhægsta fló›. Tískil skuldi veri› nóg miki› av vatni, til at skipi› ikki botna›i.

D‡pi›, har óhappi› hendi, er eini 7-8 metrar, og Dúgvan stingur 4,8 metrar.

Dúgvan hev›i fulla fer›, tá hon tók botn. Vanligt er ikki at taka fer›ina av, fyrr enn komi› er til molan. Skiparin hev›i fulla fer› á fyri at hava tryggari st‡ring.

Vegna streymin og ættina var› siglt framvi› landi nærri bryggjuni. Tvær lei›ir eru at sigla inn til Leirvíkar, og henda lei›in skuldi veri› tann rætta undir slíkum umstø›um.

Skiparin seg›i, at aldurnar vóru sera stórar, og hann hev›i frætt frá einum á landi, at skipi› hev›i rent snútan undir.

Skiparin hevur siglt nógv um Leirvíksfjør›, og hann hevur tríggjar fer›ir fyrr sæ› slíkar aldur. Hetta er eitt náttúrufyribrigdi, i› hendir sjálvt í fínasta ve›ri, og ta› er ikki naka›, sum ber til at rokna út frammanundan.

Pumpurnar á Dúgvuni klára›u ikki at halda lens, og bo› var› tí sent eftir sløkkili›num í Fuglafir›i, sum kom vi› eini pumpu. Seinni komu fleiri pumpur, og tá minka›i nøgdin av vatni í skipinum.

Kavarar fóru sí›ani ni›ur at kann ska›an, og pota› var› í rivuna.

Seytjan fer›afólk og átta bilar vóru vi› Dúgvuni henda dagin.

Jólama›urin b‡r veruliga í fjøllunum

Nú fer ta› umsí›ir at ganga sjón fyri søgn. Jólama›urin Kjøtkrókur fer næstu dagarnar fram til jóla at síggjast gangandi í fjøllunum. Í ár hevur hann farin undir n‡tt tiltak, har hann fer at vitja rørslutarna› børn, sum ikki hava møguleika at koma at síggja jólamannin »in action«.

Jólama›urin Kjøtkrókur fer aftur í ár at vera sæddur gangandi í fjøllunum.

JÓLAMA‹URIN
Stefan í Skorini

9. desember leggur jólama›urin Kjøtkrókur til brots. Tá kann hann síggjast í Kaldbaksbotni og á Velbasta›hálsi, har hann leitar eftir tveimum ø›rum jólamonnum, sum skulu hjálpa honum vi› at gera teir seinastu pakkarnar klárar til jóla. Um tú fer›ast hesa lei›, kanst tú vænta tær at bera eyga vi› Kjøtkrók. Ta› er serliga stuttligt hjá børnum, knappliga at møta jólamanninum í haganum.

Jólamenn halda ikki frí hesa tí›ina av árinum, og Kjøtkrókur fer at vera til arbei›is nærum hvønn dag fram til jólaaftan.

Vitjar vi› brandbilinum

Ein av høvu›státtunum hjá Kjøtkróki í ár, umframt at ganga í haganum, ver›ur at vitja rørslutarna› børn. Hetta eru børn, sum ikki kunnu fara at vitja jólamannin í Kaldbaksbotni ella á Velbasta›hálsi.

Ta› skal vera gjørt ordiligt, og tí hevur Kjøtkrókur fingi› brandbilin til vega. Brandbilurin fer sí›ani at koyra runt vi› jólamanninum.

Til ber hjá foreldrum at rørslutarna›um at seta seg í samband vi› Kjøtkrók, um tey vilja hava hann at koma á vitjan. Ta› ver›ur gjørt vi› at skriva navn og telefonnummar á lepan á hesi sí›uni og senda ta› til Kjøtkrók. Jólama›urin hevur sett 18. og 19. desember av til vitjanirnar vi› brandbilinum.

Adressan er: Jólama›urin Kjøtkrókur Box 3004.

Alt ókeypis

At fáa vitjan av jólamanninum er ókeypis. Kjøtkrókur hevur fingi› fleiri fyritøkur og stovnar at stu›la tiltakinum.

– Ta› er ikki fyri pening at eg geri hetta, men ta› er stuttleikin vi› tí. Eg havi havt sera nógvar gó›ar løtur vi› børnum sum jólama›ur, sigur Kjøtkrókur.

Kjøtkrókur hevur sjálvsagt okkurt gott at bjó›a børnunum, og í ár fer hann at geva børnum eini 5-6.000 posar vi› alskyns bommum.